# Tomislav er flúgvandi

Tomislav Sivic, sum áður hevur virkað í Føroyum, ger veruliga um seg í Ungarn fyri tíðina. Í vár stóð hann við stýrisvølin, tá Kecskeméti fyri fyrstu ferð vann seg upp í fremstu ungversku deildina, og higar til hevur liðið tikið øll á bóli. Kecskeméti er eftir fyrstu 11 dystirnar á fimta plássi í kappingini við 19 stigum fyri 11 dystir. Um vikuskiftið vunnu teir 1-0 á útivølli móti REAC, sum er næst niðasta liðið í deildini.



# Eli Hentze leggurfrá sær

Tað verður ikki við Eli Hentze sum venjara, at B71 fer undir uppgávuna at vinna sær sætið aftur í Formuladeildini í 2009. Ímyndin av felagnum staðfesti í sjónvarpinum í kvøld, at hann hevur boðað leiðsluna frá, at hann leggur frá sær. - Tað gjørdi eg teimum greitt fyri mánaðum síðan. Og tað var líkamikið, um vit spældu í bestu ella næstbestu deildini, sigur Eli Hentze við Kringvarp Føroya.

## 11 meistar- ar í 30 ár

**EB/Streymur er sjeynda felagið, sum vinnur FM-heitið á fyrsta sinni í hesum 30-ára skeiðnum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Besta fótbóltsligan í Føroyum hevur størri fjølbroytni, enn flest aðrar fótbóltsligur í Evropa. Hesi seinastu 30 kappingarárini hava 11 ymisk feløg vunnið Føroyameistaraheitið. HB, B36, KÍ, TB, ÍF, GÍ, B68, B71, VB, NSÍ og EB/Streymur eru feløgini, sum hava vunnið FM-heitið, kappingarárini 1979-2008.

Tað eru ikki nógv limalond í UEFA, sum kunnu reypa sær av einum slíkum margfaldni, tá tað kemur til ymiskar meistarar. Hesi 30 kappingarárini hava vit upplivað heilar 7 ferðir, at eitt felag hevur vunnið føroyameistaraheitið í bestu deildini á fyrsta sinni. Tey sjey feløgini, sum hava vunnið føroyameistaraheitið á fyrsta sinni, eru ÍF í 1979, GÍ í 1983, B68 í 1984, B71 í 1989, VB í 2000, NSÍ í 2007 og nú EB/Streymur í 2008.

Í 2004 og 2005 manglaði heldur ikki nógv í, at Skála vann føroyameistaraheitið fyri fyrstu ferð í søgu felagsins.

Annars hava 12 ymisk feløg vunnið føroyameistaraheitið, síðani ta fyrstu landskappingina, sum varð spæld í 1942. SÍ vann FM-heitið í 1947. EB/Streymur er næstyngsti FM-vinnarin í søguni. Felagsliðið í Sundalagnum hevur bert 15 ár á baki. Men tá B36 vann sítt fyrsta meistaraheitið í 1946 hevði felagið bert 10 ár á baki.

VB er elsta felagið, sum hevur vunnið FM-heitið á fyrsta sinni. Tá VB vann FM-heitið í 2000 høvdu teir rundað tey 95 árini. EB/Streymur er sætta felagið, sum vinnur greipuna. HB, KÍ, TB, GÍ og B36 eru hini feløgini, sum hava vunnið bæði FM-heitið og steypakappingina í einum og sama kappingarárið.



*B71 stríddist til tað seinasta, men heldur ikki hesa ferð var eydnan við Gudmun Nielsen og liðfeløgunum, sum altso noyðast eina deild niður at spæla í 2009*
*Mynd: Búi Falkvard Clementsen*

B71-Víkingur 0-1 (0-0):

# Takk til B71

**B71 spælur ikki í fremstu føroysku fótbóltsdeildini í 2009. Liðið, sum seinastu tvey árini hevur hugtikið flestar føroyingar, megnaði ikki at varðveita sætið í Formuladeildini, og lútaðu sandoyingar við høvdinum, tá Sam Jacobsen sendi felagið í myrkrið í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*B71*

*Víkingur*

Sandoyingar lúta við høvdinum. Og tað er einki galið við tí.

Myrkið leggur seg so dátt inni í Dal. Somuleiðis yvir tilveruna hjá B71 í Formuladeildini. Í gjár var staðfest, at lítla og hugtakandi felagið ikki longur verður millum tey bestu í føroyskum fótbólti. Stutt fyri leiklok í gjár køvdi Sam Jacobsen seinastu vónirnar hjá árstalsfelagnum, og harvið staðfesti, at árstalsfelagið úr Sandoynni ikki verður er ein partur av bestu føroysku fótbóltsdeildini komandi ár. Og tað verður heilt vist saknur í liðnum, sum hevur hugtikið flestu føroyingar við fyrimyndarligum stríðsvilja, til tíðir flottum fótbóltsspæli, egnum fólki og skemtingarsama venjaranum Eli Hentze.

### Hvussu nú?

Hóast fleiri hava hug at rópa seg serfrøðingar á økinum, so kann eingin siga, hvussu føroyskur fótbóltur liggur um eitt ár. Tí er eisini ógjørligt at siga, hvussu framtíðin hjá B71 sær út. Tað kann ikki væntast, at hugurin hjá eitt nú Gudmundi Nielsen og Símin Rógva Hansen vilja spæla í næstbestu deildini. Skulu vit trúgva leysasøgunum, so halda teir heldur ikki fram í felagnum. Ambitiónirnar eiga eisini at røkka longri. Somuleiðis er spurningurin, um teir fýra brasilumenninir – Soares, Wellington, Vieira og Santana – eru áhugaðir at spæla millum teir næstbestu. Seinastu árini hava onnur feløg í øllum førum ætlað sær málrevin Clayton Soares.

Ein av stóru trupulleikunum hjá venjaranum Eli Hentze seinasta árið hevur verið, at hann ikki hevur serliga nógv fólk at velja ímillum. Og væntandi frágongdin fer uttan iva at hava við sær, at yngru leikararnir komandi mánaðirnir mugu taka ábyrgd.

Ein frálíkur árgangur hevur tryggjað B71 tveir kappingarár í Formuladeildini. Komandi ári er sannlíkt, at venjarin skal blanda kortini uttan hesar. Men nú fáa vit at síggja.

### Høvdu yvirtakið

Sandoyingar vóru vitandi um treytirnar undan dystinum í gjár. Eydnaðist tað ikki liðnum at fáa fult ímóti Víkingi, varð niðurflyting veruleiki. Hóast ryggin móti múrinum, so var heimaliðið álopssinnað frá byrjan. B71 var meira á bóltinum, og fleiri ferðir misnýttu sandoyingarnir stórar møguleikar. Serliga var Gudmund Nielsen ofta nær við, og Clayton Soares stútaði eisini í stólpan.

Fleiri sóu ljósið, tá tað fræ̈ttist úr Klaksvík, at NSÍ var á odda. Men sandoyingar megnaðu ikki at greiða sína skyldu.

Tað var heldur ikki serliga uppiborið, at Sam Jacobsen skallaði gestirnir á odda eftir frísparksinnlegg úr vinstru, tá lítil løta restaði av dystinum.

### Rukku ikki málinum

Víkingur ætlaði sær undan kappingarárinum pláss í altjóða fótbólti í 2009. Tað eydnaðist so ikki. Men sum heild kunnu gøtufólk og leirvíkingar verða nøgdir við kappingarári. Næstbesta liðið hevur av álvara bitið frá sær, meðan Andreas Lava Olsen av álvara hevur fingið sítt gjøgnumbrot í føroyskum fótbólti.

Spurningurin er, um vit kunnu vænta hamskiftar víkingar, nú Jógvan Martin Olsen er settur sum venjari. Vørumerkið hjá felagnum hevur verið stríðsviljin og til tíðir ov harðligt spæl. Um fyrrverandi landsliðsvenjarin fer at loyva hesum er ivasamt.